# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fergie er svangur




*37 steyp standa longu í logbókini hjá Sir Alex, men hann sigur seg á ongan hátt vera mettan. Tvørtur ímóti strembar hann eftir at styrkja um evropisku søguna hjá Manchester United, sum hann sigur vera ov veika*

**Sir Alex Ferguson hevur í kvøld møguleikan at vinna sítt 38. steyp. Men hóast imponerandi sigurslistan, so sýnir hann enn ikki nøkur tekin um mettu**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hann hevur sitið við stýrisvølin í Manchester United í 22 ár, og tí eigur hann so heilt avgjørt sín stóra lut í stoltu siðvenjunum hjá enska stórfelagnum. Men Alex Ferguson setir á ongan hátt seg sjalvan í fokus, tá hann tosar um siðvenjuna hjá felagnum.

- Tað er eingin ivi um, at Sir Matt Busby var byrjanin til tað, sum felagið er í dag. Kanska er tað eisini lagnunnar speisemi, at júst Chelsea skuldi verða fyrsta enska felagið, sum tók lut í Europa-Cup, men tá fótbóltssambandið ikki vildi loyva hesum, stóð Sir Matt fast við sítt.

- Hann hevði dirvi og hugsjónir, og í dag kunnu vit bara staðfesta, hvussu enskur fótbóltur hevur ment seg takkað verið hansara avgerð. Tað er ein partur av fótbóltssøguni, sum vit eru errin um, og tí vilja vit ikki svíkja tey, sum farin eru, ella teir, sum í kvøld sita á stadion, sigur Sir Alex Ferguson.

## Ov lítlir í Evropa

Hvussu stórt og kent Manchester United enn er, so er tað ein sannroynd, at felagið ikki veruliga telist millum tey stóru í evropiskum høpi. Feløg sum Real Madrid, AC Milan og Liverpool hava í so máta eina nógv sterkari siðvenju, og tað er nakað, sum Sir Alex er fullgreiður um.

- Vit hava eina stóra søgu, men hon er ov veik í evropiskum høpi. Og tað er mín vón, at vit kunnu styrkja hana við enn einum steypi í kvøld. Sjálvur havi eg tað tó gott undan dystinum. Hetta er mín fjórða evropiska finala, so vónandi havi eg royndirnar, sum kunnu stuðla spælarunum.

Men hann vil tó ikki fara so langt sum at siga, at hetta er ein fyrimunur fram um Avraham Grant – starvsfelagan í Chelsea – sum enn ikki vunnið nakað evropiskt steyp.

- Mín fyrsta finala við Aberdeen var ímóti Real Madrid og Alfredo di Stefano. Men eg ristist ikki á hondunum, tá eg handaði honum eina whiskey-fløsku, so tað veldst sjálvandi um, hvussu tú dugir at handfara trýstið, sigur hann.

# Hagtølini eru við Chelsea

**Manchester United hevur bara vunnið tvær av seinastu 14 uppgerðunum móti Chelsea**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað kann væl vera, at Manchester United hevur eina sterkari søgu enn Chelsea. Teir hava ein venjara, sum hevur vunnið tað, sum vinnast kann, og teir eru júst kosnir enskir meistarar.

Sjálvsálitið hjá reyðu devlunum skuldi tí verið á toppinum, men tað er tó ikki á øllum økjum, at teir eru við yvirlutan.

Seinnu árini siga hagtølini nevnliga, at Manchester United bert hevur vunnið tvær av 14 uppgerðum ímóti Chelsea.

Tí er sjálvsálitið hjá teimum bláu eisini í hæddini undan uppgerðini, sum altso er fyrsta reina enska finalan í europiskum høpi.

## FAKTA

**Sigrar hjá Sir Alex Ferguson**

**Við Aberdeen:**
Skotskur meistari (3): 79/80, 83/84, 84/85
Enska FA-Cup: (4): 81/82, 82/83, 83/84, 85/86)
Skotska Liga-cup: (1): 85/86
Evropa Cup fyri steypavinnarar (1): 82/83
Evropiska Super-Cup (1): 83/84

**Við Manchester United:**
Enskur meistari (10): 92/93, 93/894, 95/96, 96/97, 98/99, 99/00, 00/01, 02/03, 06/07, 07/08
Enska FA-Cup (5): 89/90, 93/94, 95/96, 98/99, 03/04
Enska Liga-Cup (2): 91/92, 05/06
FA Charity Shield (7): 90/91, 93/94, 94/95, 96/97, 97/98, 03/04, 07/08
Champions League (1): 98/99
Evropa Cup fyri steypavinnarar (1): 90/91
Evropiska Super-Cup (1): 91/92